UTTANRÍKIS- OG VINNUMÁLARÁÐIÐ

Innanhýsis
Tórshavn, tann 8. mars 2023
J.Nr.: 22/05679
(at tilskila í svari)

Viðgjørt: ABD

Hoyringsnotat um uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um fyribyrgjandi tiltøk ímóti hvítvaski av vinningi og fígging av yvirgangi (Hvítvasklógin)
(Ígildissetan av 4. og 5. hvítvaskdirektivi o.a.)

Umhvørvis- og vinnumálaráðið sendi tann 6. februar 2023 uppskotið til hoyringar hjá viðkomandi myndugleikum og feløgum. Hoyringsfreist var tann 23. februar 2023.

Hesir myndugleikar og feløg fingu uppskotið til hoyringar:
Vinnuhúsið, Felagið Peningastovnar, Felagið Føroyskir Grannskoðarar, Advokatfelagið, Fíggjarmálaráðið, Taks, Dátueftirlitið, Føroya Realkreditstovnur, P/f Tryggingarfelagið Lív, Betri Pensjón, Betri Trygging, Trygd, Meklarin, Skyn, Betri Heim, Lívsverk – Eftirlønargrunnur Løntakaranna.

Uppskotið hevur eisini ligið frammi til hoyringar á heimasíðu Uttanríkis- og vinnumálaráðsins.

Hesir myndugleikar og feløg hava sent inn viðmerkingar til uppskotið:

- Felagið Føroyskir Grannskoðarar,
- Bank Nordik,
- P/F Tryggingarfelagið Lív,
- Skráseting Føroya
- Tryggingareftirlitið

Vinnuhúsið svaraði, at feløgini í Vinnuhúsinum ikki hava viðmerkingar til uppskotið, og Fíggjarmálaráðið og Betri Pensjón svaraðu, at tey ikki hava viðmerkingar til uppskotið.

Viðmerkingar frá Uttanríkis- og vinnumálaráðnum til hoyringssvarini:

Felagið Føroyskir Grannskoðarar
Yvirskipað tekur felagið fult undir við, at lógin verður dagførd.

Til § 14 a

Felagið tekur undir við endamálinum við ásetingini, sum er at styðja uppundir, at eigarskráin inniheldur rættar upplýsingar. Felagið mælir tó til, at ásetingin verður orðað av nýggjum. Felagið setir eisini spurnartekin við, hvussu tann tekniski parturin av fráboðanarskylduni verður lokin, og vísir í tí sambandi til § 14 a, stk. 3, har heimilað er landsstýrismanninum at áseta nærri reglur í kunngerð. Eisini setir felagið spurnartekin við, hvør rættarstøðan er viðvíkjandi tagnarskyldu í sambandi við, at slíkar fráboðanir verða sendar Skráseting Føroya.

Viðmerkingar Uttanríkis- og vinnumálaráðsins

Sambært ásetingum í 4. og 5. hvítvaskdirektivunum er tað eitt krav, at skipanir verða settar í verk, sum skulu tryggja, at upplýsingar um veruligar eigarar, sum skulu skrásetast í einari skrá, eru hóskandi, neyvar og dagførdar. Harafturat er tað ásett, at slíkar skipanir skulu hava krav um, at persónar og fyritøkur, sum skulu fremja kundakunnleikamannagongdir, skulu fráboða ósamsvar ella feilir, sum tey finna í upplýsingunum um veruligar eigarar í skránni og í teimum upplýsingunum, sum tey hava atgongd til. Kravið er eisini galdandi fyri viðkomandi myndugleikar.

Í Føroyum varð skipanin við skráseting av veruligum eigarum sett í verk tann 1. februar 2022. Skráseting Føroya hevur ment eina kt-skipan, har upplýsingarnar verða skrásettar. Skipanin er nýggj, og arbeitt verður áhaldandi við at fáa allar upplýsingarnar skrásettar í skipanini. Men enn er dátu-goymslan í skipanini ikki heilt fullfíggjað.

Tað er neyðugt fyri, at skipanin við fráboðan sambært § 14 a skal virka eftir ætlan, at ein kunngerð verður lýst við heimild í § 14 a, stk. 3 í hvítvasklógini. Henda kunngerðin er ikki fyrireikað enn.

Uttanríkis- og vinnumálaráðið hevur tí í gildiskomureglunum skotið upp eina áseting, har landsstýrismaðurin fær heimild til at áseta í kunngerð, nær § 14 a kemur í gildi. Á tann hátt verður fráboðanarskyldan ikki sett í gildi fyrr enn eigaraskráin hjá Skráseting Føroya er fullfíggjað, og nevnda kunngerðin við heimild í § 14 a, stk. 3 í hvítvasklógini er fyrireikað.

Viðvíkjandi spurninginum hjá Felagnum Føroyskir Grannskoðarar um tagnarskylduna skal verða víst á, at tað eftir ætlan verður ásett í kunngerðini, sum skal setast í gildi við heimild í § 14 a, stk. 3 í hvítvasklógini, at slíkar fráboðanir eru í trúnaði og sostatt undantiknar innlitslógini og fyrisitingarlógini.

Uttanríkis- og vinnumálaráðið hevur ikki gingið áheitan felagsins á møti um at orða ásetingina í § 14 a av nýggjum.

Til § 17, stk. 7
Felagið vísir á, at listin hjá Fíggjareftirlitinum yvir politiskt ábærar persónar er mangulfullur, og vísir á týdningin av, at myndugleikin hevur síni viðurskifti uppá plass hesum viðvíkjandi.

Felagið vísir á, at tað er vert at umhugsa, um tað ber til at víkja eitt vet frá allýsingini av "family members" ella "nærstandandi" í ES-direktivinum soleiðis, at persónsbólkurin verður eitt sindur smalari í Føroyum.

Viðmerkingar Uttanríkis- og vinnumálaráðsins
Uttanríkis- og vinnumálaráðið fer at heita á Fíggjareftirlitið um at fáa listan dagførdan, og at hetta arbeiðið verður gjørt saman við umboðum fyri føroyskar myndugleikar.

Allýsingin av "nærstandandi" er ásett í § 2, nr. 6 í hvítvasklógini. Ásetingin svarar til ásetingina í grein 3, nr. 10 í 4. hvítvaskdirektivinum hjá ES, har "familiemedlemmer" verður allýst:

Ásetingin er soljóðandi:

10) »familiemedlemmer«:

a) ægtefællen til en politisk eksponeret person, eller en person, der kan sidestilles med en ægtefælle til en politisk eksponeret person
b) børn og deres ægtefæller eller personer, der kan sidestilles med en ægtefælle til en politisk eksponeret person
c) forældre til en politisk eksponeret person.

Harvið er allýsingin í § 2, nr. 6 í hvítvasklógini í samsvar við allýsingina í 4. hvítvaskdirektivinum.

Uttanríkis- og vinnumálaráðnum kunnugt er eingin undantaksheimild til ásetingina í 4. hvítvaskdirektivinum.

Til viðmerkingar felagsins um "kontantgjaldsbannið"
Felagið undrast á, at kontantgjaldsbannið í § 5 í galdandi hvítvasklóg verður standandi sum "50.000 kr.", tá upphæddin í t.d. Danmark liggur á "20.000 kr.".
Felagið heldur, at tað eigur at verða umhugsað at broyta upphæddina, tí tað vildi ført til lægri váða fyri hvítvask í Føroyum. Víst verður í hesum sambandi til nýggjastu váðametingina hjá SØIK fyri Føroyar frá januar 2023, s. 253.

Viðmerkingar Uttanríkis- og vinnumálaráðið
Kontantgjaldsbannið er galdandi fyri øll vinnurekandi, sum ikki eru fevnd av § 1, stk. 1 í hvítvasklógini, og ásett er, at tey vinnurekandi ikki mugu taka ímóti kontantgjaldingum á 50.000 kr. ella meira.

Ásetingin samsvarar við krøvini í grein 2, stk. 1, nr. 3, litra e, og í grein 11, litra d í 4. hvítvaskdirektivinum hjá ES, har tað er ásett, at kontantgjaldsbannið skal vera 10.000 evrur ella minni. Í 4. hvítvaskdirektivinum stendur eisini, at londini sjálvi skulu hava møguleika til at áseta lægri mørk og aðrar avmarkingar fyri nýtsluna av reiðum peningi.

Í Danmark varð kontantgjaldsbannið lækkað úr 50.000 kr. niður í 20.000 kr. tann 1. juli 2021.

Uttanríkis- og vinnumálaráðið hevði ikki hesa broyting við í uppskotinum, sum varð sent viðkomandi pørtum til hoyringar. Mett verður, at allir viðkomandi partar eiga at verða hoyrdir, áðrenn uppskot verður lagt fyri Løgtingið um at lækka kontantgjaldsbannið. Stundir eru ikki til hetta nú. Eitt møguligt uppskot um hetta kann tí verða fyrireikað og viðgjørt seinni.

Bank Nordik

Í høvuðsheitum tekur Bank Nordik undir við lógaruppskotinum.

Til § 9
Bank Nordik vísir á, at broytingin í § 9, stk. 1, nr. 1 ongan týdning hevur, og mælir tí til, at broytingin ikki verður framd fyrr enn tað er álagt fyritøkum og persónum, ið eru fevnd av hvítvasklógini, veruliga at uppfylla hesa skyldu.

Viðmerkingar Uttanríkis- og vinnumálaráðið
Broytingin er skotin upp fyri, at ásetingin í § 9, stk. 1, nr. 1 skal verða í samsvari við grein 1, stk. 1, nr. 9 í 5. hvítvaskdirektivinum.

Uttanríkis- og vinnumálaráðið hevur tí valt ikki at strika ásetingina úr uppskotinum. Sambært viðmerkingunum hevur broytingin ongan týdning, men verður hon sett í gildi, tí lóggávan skal vera í samsvari við ásetingina í grein 1, stk. 1, nr. 9 í 5. hvítvaskdirektivinum.

Til § 14 a
Bank Nordik mælir til, at ásetingin fyrst fær veruligan virknað, tá ið feløg, ið hava skyldu at skráseta veruligar eigarar, halda hesa skyldu, so fyritøkur, ið eru fevndar av hvítvasklógini hava veruligar upplýsingar at samanbera við.

Viðmerkingar Uttanríkis- og vinnumálaráðið
Uttanríkis- og vinnumálaráðið hevur tikið viðmerkingina hjá Bank Nordik til eftirtektar, og nú er skotið upp, at ásetingin í § 14 a kemur ikki í gildi samstundis, sum lógin annars kemur í gildi. Í gildiskomureglunum er skotið upp, at landsstýrismaðurin ásetir í kunngerð, nær § 14 a kemur í gildi.

Til § 29 a
Bank Nordik vísir á, at tað við ásetingini í § 29 a í uppskotinum verður lagt upp til, at tað skal gerast møguligt hjá viðkomandi myndugleikum at síggja, hvør persónur eigur fastogn í Føroyum. Soleiðis sum hesi viðurskiftini eru skipað í Føroyum nú ber tað einans til at kanna ognarviðurskiftini fyri ognir hvør sær, men í ásetingini í § 29 a verður sipað til eina størri skipan, sum ikki er ment enn í Føroyum.

Viðmerkingar Uttanríkis- og vinnumálaráðið
Uttanríkis- og vinnumálaráðið er samt við Bank Nordik í, at tað ikki finst ein skipan í Føroyum, har eftirlitsmyndugleikar kunnu sláa upp fyri at síggja, hvørjar fastognir ein ávísur persónur í Føroyum eigur. Tað ber einans til at fáa at vita, hvør eigur eina ávísa fastogn. Ein skipan, sum víst varð til í uppskotinum til § 29 a, er ikki ment enn, og tað er ógreitt, nær ein slík skipan fer at verða liðugt ment, og fer at virka í Føroyum.
Uttanríkis- og vinnumálaráðið hevur tí valt at strika ásetingina úr uppskotinum.

Til § 34 a
Bank Nordik vísir á, at tað í serligu viðmerkingunum til ásetingina § 34 a er ein feilur, tí tað eigur ikki at verða víst til § 36 a, men til § 34 a.

Viðmerkingar Uttanríkis- og vinnumálaráðið
Uttanríkis- og vinnumálaráðið hevur rættað feilin í serligu viðmerkingunum.

Til § 59, stk. 5
Bank Nordik vísir á, at tað í sambandi við, at fyrningarfreistin verður longd frá 5 árum upp í 10 ár, eigur at verða tikið hædd fyri, at fyritøkur og persónar, ið eru fevnd av fyrningarfreistini í hvítvasklógini, væntandi ikki hava upplýsingar um kundasambond goymdar í meiri enn 5 ár aftur í tíð. Bank Nordik mælir til, at fyrningarfreistin verður stigvíst longd 1 ár fyri hvørt ár, inntil hon verður 10 ár.

Viðmerkingar Uttanríkis- og vinnumálaráðið
Í uppskotinum, sum var úti til hoyringar, var eingin skiftisregla ásett viðvíkjandi fyrningarfreistini.

Uttanríkis- og vinnumálaráðið hevur nú skotið upp eina skiftisreglu soleiðis, at tað nú er ásett, at 10 ára fyrningarfreistin eisini er galdandi fyri lógarbrot, sum eru framd, áðrenn gildiskomuna. Tó er hetta ikki galdandi, um málið er fyrnað innan gildiskomuna. Á henda hátt verður tryggjað, at mál, sum eru 5 ár ella eldri, tá lógin kemur í gildi, og har skjøl o.a. tí eru koyrd burtur, ikki koma undir nýggju 10 ára fyrningarfreistina.

Lív

Lív vísir til viðmerkingarnar, sum felagið hevði í sambandi við, at hvítvasklógin varð sett í gildi (løgtingmál nr. 017/2020), og vísir á, at Lív tá mælti til, at hædd varð tikið fyri serføroyskum viðurskiftunum á lívstryggingar- og eftirlønarøkinum.

Viðmerkingar Uttanríkis- og vinnumálaráðið
Tá løgtingsmál nr. 017/2020 varð til viðgerðar viðgjørdi Umhvørvis- og vinnumálaráðið allar innkomnu viðmerkingarnar, heruppií eisini tær frá Lív. Í tí sambandi varð m.a. víst á, at tað ikki er í samsvari við 4. hvítvaskdirektivið, at eftirlønar- og lívstryggingarfeløg einans eru fevnd av lógaruppskotinum fyri tær pensjónir, sum ikki eru liður í starvssetan, og sum ikki eru fevndar av eftirlønarlógini. Føroyar eru ikki bundnar av direktivinum, men um lóggávan ikki er í samsvari við direktivið, kann tað skapa iva, hvørt føroysk lóggáva er í samsvari við FATF tilmælini, og tað kann hava við sær atfinningar frá altjóða eftirlitsstovnum á økinum, sum kunnu hava óhepnar avleiðingar fyri føroyska fíggjargeiran.

Viðmerkingarnar frá Lív til lógaruppskotið í 2020 hava ikki við sær, at Uttanríkis- og vinnumálaráðið fer at gera serstakar tillagingar fyri eftirlønar- og lívstryggingarøkið í lógaruppskotinum, sum nú fyriliggur, og sum grundgeving fyri hesum verður víst til løgtingsmál nr. 017/2020.

Til § 17, stk. 7.
Lív tekur undir við, at øll, ið eru fevnd av ásetingini, hava ein lista at virka eftir uttan mun til, um talan er um yvirtikið málsøki ella ikki. Lív ger vart við, at tað í sambandi við herdu eftiransingarskylduna við politiskt ábærum persónum og teirra nærstandandi eigur at verða tikið atlit til, at tað í eftirlønarlógini er byrgt upp fyri møguleikanum at misnýta eftirkønarskipanir til hvítvask og fígging av yvirgangi.

Viðmerkingar Uttanríkis- og vinnumálaráðið
Tað er krav sambært 4. hvítvaskdirektivinum, at eisini eftirlønar- og lívstryggingarfeløg koma undir reglurnar um politiskt ábærar persónar, hóast váðin er lítil. Uttanríkis- og vinnumálaráðið hevur tí ikki skotið upp nakra broyting í reglunum um politiskt ábærar persónar við atliti til serlig viðurskifti á eftirlønar- og lívstryggingarøkinum.

Tryggingareftirlitið

Flestu viðmerkingarnar frá Tryggingareftirlitinum eru av tøkniligum slag. Uttanríkis- og vinnumálaráðið hevur rættað teir feilir í uppskotinum, sum Tryggingareftirlitið vísir á.

Til § 32 a
Tryggingareftirlitið spyr, hvør myndugleiki í Føroyum skal hava ábyrgd av at almannakunngera nøvnini av likamligum og løgfrøðiligum persónum, bólkum ella eindum, sum eru sett á lista hjá

ST yvir revsitiltøk. Eisini mælir Tryggingareftirlitið til eina nærri lýsing av, hvussu skipanin kemur at virka í Føroyum.

Viðmerkingar Uttanríkis- og vinnumálaráðið
Talan er um eina nýggja áseting, har lagt verður upp til, at landsstýrismaðurin kann tilnevna ein myndugleika, sum hevur ábyrgdina av at almannakunngera nøvnini hjá likamligum og løgfrøðiligum persónum, bólkum ella eindum, ið eru sett á listar hjá ST yvir revsitiltøk.

Fyri, at ein slík skipan kann verða sett í verk og fáast at virka, er neyðugt, at ein myndugleiki hevur fyrireikað mannagongdir o.a. frammanundan, heruppií eisini at gera vegleiðing um, hvussu fyritøkur og persónar, sum uttan óneyðugt drál eiga at frysta ognir, skulu fyrihalda seg.

Enn er eingin avgerð tikin um, hvør myndugleiki skal umsita hesa skipanina, og fer skipanin ikki at virka fyrr enn ein myndugleiki er tilnevndur, og myndugleikin hevur fyrireikað seg til uppgávuna.

Skráseting Føroya
Skráseting Føroya staðfestir í sínum viðmerkingum, at fleiri uppgávur verða sambært uppskotinum lagdar til stovnin, og at játtanin til stovnin sambært fíggjarlógaruppskotinum fyri 2023 er raðfest til eftirlitsarbeiði sambært hvítvasklógini og grannskoðaralógini.